## Bergen Swim Festival 2011:

# Føroyar stóðu seg sera væl




*Føroysk svimjing hevur buldrað avstað seinastu árini. Pál Joensen hevur slóðað fyri, og hann hevur givið heimsins bestu svimjarum skarpan gang í fleiri førum. At føroysk svimjing er annað enn Pál Joensen, var kappingin í Bergen eisini greitt dømi um*

## Pál var næstbesti svimjarin

Pál Joensen fekk næstflest FINA-stig á Bergen Swim Festival um vikuskiftið. Vágbingurin var sostatt kosin næstbesti svimjarin á stevnuni. Pál Joensen var fremstur seinnapartin í gjár. Hann fekk 850 FINA-stig í 400 metra frí. Aschwin Wildeboer, sum fekk silvursheiðursmerki í heimsmeistarakappingini síðsta summar, fekk 869 stig í 50 metra ryggsvimjing. Tá fór hann framum Pál Joensen.

Pál Joensen fekk fleiri FINA-stig enn svenska Stefan Nystrad, sum fyrr hevur havt heimsmet í 50 metra frí og 100 metra frí. Hann fekk 845 FINA-stig um vikuskiftið.

*- uni*

**FÓTBÓLTUR Føroysku svimjararnir gjørdu bart í Bergen um vikuskiftið. Føroyar fingu sjey gullheiðursmerki, fýra silvurheiðursmerki, tvey bronsuheiðursmerki, umframt føroyskt juniormet**

Uni Holm Johannesen

Úrslitini hjá føroysku svimjarunum, sum tóku lut í Bergen Swim Festival um vikuskiftið, vóru stak góð. Serliga stóð Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, seg væl. Hann hevur av álvara gjørt um seg seinastu mánaðirnar. Aftur hesa ferð vóru hansara úrslit góð. Magnus Jákupsson vann trý gullmerki, eitt bronsuheiðursmerki, umframt at hann setti nýtt føroyskt juniormet.

### Bjarnason var ikki við

Jón Bjarnason er venjari hjá Páli Joensen. Bjarnason noyddist at geva avboð hesaferð, og hann var ikki við á ferðini. Avtala var fingin í lag við Christian Tessner, sum er høvuðsvenjari hjá Havnar Svimjifelag, at hann skuldi hava evstu ábyrgdina av Páli Joensen um vikuskiftið. Hinir sum tóku lut vóru Magnus Jákupsson, HS, Óli Mortensen, HS, og Eyðbjørn Joensen, SuSvim.



*Magnus Jákupsson vann trý gullmerki, eitt bronsuheiðursmerki, umframt at hann setti nýtt føroyskt juniormet*

### Tvær gull til Pál

Pál Joensen vann tvey gullheiðursmerki hesaferð. Hann var fremstur í 200 metra frí og 400 metra frí. Vágbingurin vann á 400 metrum framman fyri danska Anders Lie, sum var nummar tvey, og norska Gard Kvale, sum var nummar trý. Pál Joensen var umleið átta sekund framman fyri næsta kappingarneytan.

Pál Joensen royndi seg í 100 metra frí í gjár, men tað hilnaðist ikki eins væl. Tá var hann nummar fýra.

### Tveir eru á veg

Føroysk svimjing hevur buldrað avstað seinastu árini. Pál Joensen hevur slóðað fyri, og hann hevur givið heimsins bestu svimjarum skarpan gang í fleiri førum. At føroysk svimjing er annað enn Pál Joensen, var kappingin í Bergen eisini greitt dømi um. Umframt Magnus Jákupsson, smæddust Óli Mortensen, HS, og Eyðbjørn Joensen, SuSvim, ikki burtur. Teir tóku lut í kappingunum fyri yngru juniorarnar, og teir vunnu eisini fleiri heiðursmerki. Tað er greitt tekin um, at Føroyar fara helst eisini at eiga virknan leiklut í svimjielituni næstu árini.

## FØROYSKU ÚRSLITINI UM VIKUSKIFTIÐ

**Gull:**

| | | |
|---|---|---|
| Pál Joensen, SuSvim | Gull í 200 frí, seniorar | 1:48.81 |
| Pál Joensen, SuSvim | Gull í 400 frí, seniorar | 3:44.65 |
| Magnus Jákupsson, HS | Gull í 200 rygg, eld. juniorar | 2:03.94 |
| Magnus Jákupsson, HS | Gull í 100 rygg, eld. juniorar | 56.45 |
| Magnus Jákupsson, HS | Gull í 50 firvald, eld. juniorar | Knock-out |
| Óli Mortensen, HS | Gull í 50 frí, yng. juniorar | Knock-out |
| Eyðbjørn Joensen, SuSvim | Gull í 100 frí, yng. juniorar | 55.07 |

**Silvur:**

| | | |
|---|---|---|
| Óli Mortensen, HS | Silvur í 200 frí, yng. juniorar | 2:0056 |
| Óli Mortensen, HS | Silvur í 100 frí, yng. juniorar | 55.20 |
| Eyðbjørn Joensen, SuSvim | Silvur í 200 firvald, yng. juniorar | 2:23.74 |
| Magnus Jákupsson, HS | Silvur í 50 rygg, eld. juniorar | Knock-out |

**Bronsa:**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðbjørn Joensen, SuSvim | Bronsa í 200 frí, yng. juniorar | 2:01.14 |
| Eyðbjørn Joensen, SuSvim | Bronsa í 50 frí, yng. juniorar | Knock-out |

**Føroyskt juniormet:**

| | | |
|---|---|---|
| Magnus Jákupsson, HS | 200 blanda | 2:08.25 |